# Siglingin hjá Dúgvuni um Leirvíksfjørð í vanda

**Strandferðslan ætlar at Dúgvan skal sigla meiri, men tað góðtaka fakfeløgini ikki**

LEIRVÍKSLEIÐIN
*Áki Bertholdsen*

Siglingin hjá Strandferðsluni var ikki meiri enn komin í rættlag eftir verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum, so hevur ein nýggj ósemja tikið seg upp sum eisini er ein hóttan ímóti siglingini um Leirvíksfjørð.

Strandferðslan hevði ætlað at økja túratalið um Leirvíksfjørð so at Dúgvan kom at sigla ein túr afturat á miðdegi, umframt at hon skuldi sigla longri út á kvøldið.

Tilsamans skuldi hon sigla einar 900 túrar fleiri um Leirvíksfjørð um árið, enn hon hervur gjørt higartil.

Men fyri at tað skuldi lata seg gera, hevur ta verið neyðugt at seta eina manning afturat umborð á Dúgvuna, so at tað hereftir verða tríggjar manningar knýttar at skipinum, higartil hava tað verið tvær.

Strandferðslan sigur, at hetta er neyðugt fyri at tað skal bera til at halda reglarnar um hvíld til manningarnar.



*Siglingin um Leirvíksfjørð er ikki meiri enn byrjað aftur aftaná verkfallið, fyrrenn ein nýggj ósemja hevur tikið seg upp*

**Fakfeløg nokta**

Men hetta vilja fakfeløgini ikki góðtaka.

Øll tey trý feløgini, sum hava manning umborð á Dúgvuni, hava boðað Strandferðsluni skrivliga frá, at tey góðtaka ikki ætlanina hjá Strandferðsluni.

Tey trý feløgini eru Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Starvsmannafelagið.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at hendan nýggja skipanin, sum Strandferðslan ætlar at seta í verk, er ikki umfatað av sáttmálanum.

– Tað stendur eisini í sáttmálanum, at verða munandi broytingar settar í verk, kann tað bara gerast eftir samráðingar við fakfeløgini, men tað er ikki gjørt í hesum føri.

Fakfeløgini siga, at tey fara ikki at góðtaka nýggju ferðaætlanina hjá Strandferðsluna uttan at tað er gjørt eftir samráðingar við feløgini, men sum støðan er í løtuni, eru tey ikki so frægt sum kunnað um ætlanina.

Feløgini boða tí frá, at inntil feløgini og Strandferðslan eru samd um broytingarnar, fara tey at nokta manningini á Dúgvuni at sigla eftir nýggju ferðaætlanini so at hon bara fær loyvi at sigla, sum hon plagir eftir gomlu ferðaætlanini.

Ellintur Abrahamsen sigur, at tann nýggja ferðaætlanin er ein stór broyting frá tí, sum manningin er von við.

– Skulu tríggjar manningar umborð á Dúgvuna, hvørvur øll yvirtíðin og tað fer at merkja ein munandi lønarniðurskurð hjá manningini.

– Vit hava tískil biðið Strandferðsluna um samráðingar um støðuna. Fáa vit ikki tær samráðingarnar, kann hvat sum helst henda, sigur hann, uttan at hann útgreinar tað nærri.

– Vit skulu hava semju um nýggju vaktarskipanina, samstundis sum lønin hjá manningini skal skerjast minst møguligt, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann heldur, at verður arbeiðið skipað øðrvísi, kundi tað borið til at hildið reglurnar um hvíld, hóast siglt verður meiri.

**Fyri gerðarrætt**

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at Strandferðslan hevur fullan rætt at gera, tað, hon hevur gjørt.

– Vit hava eisini lagt broytingarnar fyri manningina á Dúgvuni og samskift við hana um nýggju ferðaætlanina, so tann partin av sáttmálanum hava vit hildið.

– Strandferðslan hevur rætt at tulka sáttmálan, sum vit gera og vit hava ikki gjørt annað, enn tað, vit hava heimild til eftir sáttmálanum.

Hann sigur, at málið er eisini lagt fyri Fíggjarmálastýrið, sum hevur gjørt sáttmálan og har eru tey samd í, at Strandferðslan hevur rætt at seta broytingarnar í verk og meiri ætlar hon ikki at gera við málið.

– Er ósemja um, hvussu sáttmálin skal tulkast kann málið leggjast fyri ein gerðarrætt, sum so kann taka støðu, sigur Reidar Nònfjall.

# Fara at gera brúnnar ístand

**Fleiri av teimum gomlu bátabrúnum á Tvøroyri eru illa farnar, men nú er ætlanin at gera tær ístand**

VARÐVEITSLA
*Áki Bertholdsen*

**Tvøroyri:** Tvøroyrar Kommuna ætlar nú at taka eitt tak fyri at varðveita tær gomlu træbrúnnar í sóknini.

Fleiri av hesum bátabrúnum av træi eru framvið fjørðinum, nógvar av teimum eru rættiliga illa farnar. Hesar træbrúnnar vóru ein miðdepil í virkseminum á plássinum og tí hava tær eisini siðsøguligan týdning, men nú eru nógvar av teimum í so ringum standi av roti, at tær eru avbyrgdar fyri at fólk ikki skulu brúka tær, tí tað er hættisligt.

Á býráðsfundi í farnu viku samtykti býráðið at fara unir arbeiðið at varðveita hesar brúnnar.



*Brúgvin niðanfyri húsið, sum heilsølan hjá Poul Hansen helt til í, er ein av brúnum framvið Trongisvágsfirði, sum ætlanin er at gera ístand*

Í fyrstu syftu verður hugsað um Hvítanesbrúnna undir bygninginum, har Poul Hansen helt til.

Í øðrum lagi verður hugsað um at gera skúlabrúnna ístand, tað er brúgvin undir gamla skúla í Trongisvági.

Kommunan hevur fingið pelar frá SEV, sum ætlanin er at brúk at styrkja og lyfta endan á Hvítanesbrúnni upp.

Skúlabrúnna hava fólk í grannalagnum boðið sær til at gera aftur ókeypis, útvegar kommunan teimum tilfarið.



# Sinnisbati kært Serforsorgina til løgtingsins umboðsmann

**Sinnisbata varð sýtt at fáa at vita, hvør skuldi seta psykiatriska samskiparan, sum nú er settur. Hetta vildi felagið ikki góðtaka og kærdi Serforsorgina til løgtingsins umboðsmann**

SINNISBATI
*Turið Kjølbro*



*- Sum einasta áhugafelag hjá sálarliga sjúkum og avvarðandi teirra, vildu vit ikki góðtaka, at okkum varð noktað at fáa at vita, hvør skuldi seta psykiatriska samskiparan, sigur Svenning av Lofti*

Sum einasta áhugafelag í landinum hjá sálarliga sjúkum og avvarðandi teirra, metir Sinnisbati, at tað var bæði rímiligt og rætt, at felagið fekk – um ikki umboðan, so innlit í, hvør mannaði bólkin, sum hevur sett fyrsta psykiatriska samskiparan at taka sær av psykiatriska økinum í Føroyum. At seta samskipara burtur av til psykiatriska økið hevur verið eitt av hjartamálunum hjá Sinnisbata í nógv ár. Tá ið Serforsorgin noktaði felagnum innlit í, hvør mannaði bólkin, gjørdi Sinnisbati ikki mætari enn at kæra Serforsorgina inn fyri løgtingsins umboðsmann.

– Sum áhugafelag mettu vit, at tað hevði verið gott, um felagið kundi vera við til mæla til, hvør psykiatriski samskiparin skuldi vera. Hetta varð sýtt okkum, men at sýta okkum at fáa at vita, hvør sat í bólkinum, sum skuldi tilmæla, hvør samskiparin skuldi vera, meta vit ikki er rætt, sigur Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata.

Tískil kærdi felagið Serforsorgina inn til løgtingsins umboðsmann. Hesin hevur longu svarað kæruni og víst hana aftur í fyrsta umfari út frá teirri grundgeving, at felagið kundi havt kært Serforsorgina til Almanna- og heilsumálastýrið fyrst.

– Hví vit ikki kærdu til Almanna- og heilsumálastýrið fyrst, er tí, at vit í grundini ikki reiðiliga vistu, hvar vit skuldu kæra. Aftaná kunnu vit siga, at vit áttu at havt kært har fyrst, sigur Svenning av Lofti.

Psykiatriski samskiparin er settur, men hvør viðkomandi er, er ikki alment enn. Formaðurin í Sinnisbata leggur dent á, at kæran til løgtingsins umboðsmann ikki skal tulkast soleiðis, at felagið hevur nakað ímóti samskiparanum, ei heldur Serforsorgini.

– Vit hava góð viðurskifti við Serforsorgina og vit heilsa nýggja samskiparanum vælkomnum. Tað er mannagongdin í málinum, sum vit hava kært, sigur Svenning av Lofti.

# Tvøroyrar kommuna sleppur sær undan ábyrgdini

**– Tað er harmiligt, at Tvøroyrar kommuna er fús at lata serstovur og amboð fara fyri skjeyti, tí hon ikki vil gjalda fyri savnsrøktina. Ógvuliga spell, at ein kommuna vil ganga so vítt fyri at halda upp á nøkur prinsipp, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag**

SAVNSRØKTIN
*Turið Kjølbro*



*Í seks kommunum verður savnsrøktin dagførd í hesum døgum, men á Tvøroyri verður savnsrøktin framvegis blokerað. Savnsmynd*

Týsdagin í farnu viku skrivaðu Føroya Lærarafelag, Kommunusamskipan Føroya, Mentamálastýrið og Fíggjarmálastýrið undir semju um savnsrøktina, sum hevur veruð stríðsmál í nógv, nógv ár. Men beinanvegin varð greitt, at eina kommunan í Kommunusamskipanini, Tvøroyrar kommuna ikki góðtekur semjuna, sum ikki er bindandi fyri kommunurnar í felagsskapinum. Í viðtali í blaðnum fríggjadagin sigur borgarstjórin í Tvøroyrar kommunu, Finnleif Guttesen, at semjan skúgvar útreiðslur frá landinum yvir á kommunurnar og tað vil Tvøroyrar kommuna ikki góðtaka.

Avleiðingarnar av, at Tvøroyrar kommuna ikki vil bindast av semjuni, eru, at blokadan av savnsrøktin, sum umfatar kommunurnar, ið eru limir í Føroya Kommunufelag, nú eisini umfatar Tvøroyrar kommunu. Tað merkir, at lærarar á skúlunum í hesum kommunum ikki sleppa at røkja stovurnar og amboð. Hendan blokadan hevur verið í gildi í fleiri mánaðir nú, og avleiðingarnar av henni eru, at hvørki høli ella amboð nógva staðni eru nýtilig longur.

– Tað er hugstoytt og harmiligt, at ein kommunu meldar frá, serliga tá ið tað ræður um prinsipp og ikki pengar. Tað sum verri er, er, at Tvøroyrar kommuna er fús at lata høli, serstovur og amboð fara fyri skjeyti, tí hon ikki vil gjalda fyri savnsrøktina, ein upphædd, sum liggur um 20.-30.000 kr. um árið. Landið rindar fyri helmingin og Føroya Lærarafelag er avgjørt um, at tað er Tvøroyrar kommuna, sum sleppur sær undan ábyrgdini. Ógvuliga spell, at ein kommuna vil ganga so vítt fyri at halda upp á nøkur prinsipp, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Undir drúgvu samráðingunum um savnsrøktina heitti Føroya Lærarafelag á Kommunusamskipan Føroya um, at semjan skuldi verða bindandi fyri kommunurnar í felagsskapinum, men Kommunusamskipanin hevur alla tíðina gjørt greitt, at tað ikki ber til at gera avtalur vegna allar kommunurnar, sum hava eykaútreiðslur við sær.

Sum skilst roynir Mentamálastýrið framvegis at finna eina loysn viðvíkjandi savnsrøktini við hinar kommunurnar. Seinasta fríggjadag vóru umboð frá Mentamálastýrinum á fundi við Føroya Kommunufelag.

## Kári Svensson í Roskilde

FRAMSÝNING
*Turið Kjølbro*

Leygardagin letur listaframsýning upp í Roskilde Kunstforening við verkum hjá Kára Svensson. Framsýningin verður opin fram til 22. juni. Bjørn Dahl, borgarstjóri í Roskilde, býður vælkomin, og Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimur, heldur røðu. Undir ferniseringini er føroyskur dansur við dansiringinum Fótatraðk, sum heldur til í Danmark, og borðreitt verður við føroyskum mati og øl.

Sum málari hevur Kári Svensson flutt seg frá naturaliska landslagsmálninginum. Hann er farin frá tí figurativa við føroyskum fjøllum, havinum og bygdunum til abstrakta formmálið, har kjarnan í størri mun er málningurin sjálvur. Tað avgerandi í teimum nýggjaru verkunum er litklangurin, javnvágin í myndunum umframt rútmiska og dýnamiska úttrykkið. Myndirnar hava gjørt seg leysar frá myndaevninum. Tað er ikki longur veruleikin, sum hann hevur sæð hann, sum verður endurgivin, men heldur egnar upplivingar av náttúruni, tað sum er trupult at lýsa við orðum.

Kári Svensson, sum er føddur í 1954, byrjaði at mála í 1986. Hann hevur tikið lut á nógvum framsýningum uttanlands síðani.